## NSÍ skorið 37 prosent av rakstrinum

NSÍ, ið hevur verið eitt av frægastu liðunum í Føroyum hevði aðalfund mikudagin. Har kom millum annað fram, at felagið hevði eitt ávíst hall í fjør. - Vit høvdu eitt hall, men nú taka vit avleiðingarnar av hesum og hava skorið 37 prosent av rakstrinum, sigur Andrias Lamhauge, formaður í NSÍ. Hann leggur afturat, at felagið er sera positivt viðvíkjandi gongdini í 2009.



## Verjuleikari til EB/Streym

Heimasíðan hjá Kringvarpinum skrivar, at Bárður H. Joensen í komandi kappingarári skal spæla við EB/Streymi. - Eg fari til EB/Streym, tí teir hava ein góðan hóp og hava spennandi avbjóðingar í Evropa, sigur Bárður H. Joensen við heimasíðuna hjá Kringvarpinum. Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi, staðfestir, at hetta verður seinasta tilgongdin hjá felagnum í vetur. Verjuleikarin hevur fyri tað mesta verið knýttur at B36, men seinasta árið hevur hann verið burtur frá fótbóltinum.

# Platini vil hava fleiri dómarar á vøllinum

**UEFA-forsetin vil hava, at fleiri dómarar skulu verða á vøllinum. Hetta skal gerast fyri at minka um talið av mistøkum**

FÓTBÓLTUR

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

UEFA-forsetin, fraklendingurin Michel Platini hevur nú eina loysn uppá, hvussu ein kann minka um talið av mistøkum hjá fótbóltsdómarunum. Gjøgnum fleiri ár hevur verið drúgt kjak í fótbóltsheiminum, um hvussu ein fær talið av dómaramistøkum niður. Nýtsla av sjónbondum, og onnur tøkni hevur eisini verið nevnd. Kortini hevur verið stór ósemja um hetta.

Men nú hevur Michel Platini skorið ígjøgnum, og skotið upp, at fleiri dómarar skulu verða á vøllinum: - Okkum tørvar ikki tøkni, okkum tørvar fleiri dómarar. Um vit øktu talið av dómarum til dystirnar, so høvdu 80% av dómaramistøkunum horvið. Sigur UEFA-forsetin við italska ítróttarblaðið, Corriere dello Sport.

Platini nevnir sum dømi málið, sum Inter-spælarin, Adriano skoraði ímóti Milan farna vikuskiftið. Adriano brúkti hondini, men dómari sá ikki tilburðin, og dømdi mál til Inter.



*UEFA-forsetin heldur tað kann minka um mistøkini á vøllinum, um tað verður meira enn tann eini dómarin á fótbóltsvøllinum*

## H71 má basa toppinum

**Størsti spenningurin undan vikuskiftinum er helst um dystin í Hoyvík, har H71 tekur ímóti VÍF**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hoyvíkingar dystast í løtuni ein harðan dyst við Neistan um at sleppa í FM-finalurnar.

Í hesum dystinum eru neyvan ráð til tey nógvu mistøkini, og tí er altavgerandi, at H71 fær nakað burturúr, nú oddaliðið úr VÍF kemur á vitjan.

Higartil í ár hevur H71 tvær ferðir vunnið á vestmenningunum, og tað er uttan iva viðvirkandi til eitt gott sjálvsálit hjá hoyvíkingunum undan dystinum.

Vestmenningar hava hinvegin verið væl koyrandi hampuliga leingi, og hóast oddasessin kunnu teir enn ikki kenna seg vísar í nøkrum sum helst. Og tí er ein sigur á argastu kappingar-neytunum eisini av ovurstórum týdningi hjá teimum.

Í Havn tekur Neistin móti StÍF, ið mest sum varð sett púrasta av í oddadystinum seinasta vikuskiftið. Neistin hevur eisini verið væl fyri seinastu umførini, og tí mugu teir roknast sum hampuliga greiðir favorittar undan dystinum. Eisini hóast StÍF fleiri ferðir í ár hevur meira enn bara argað Neistan.

Seinasti dysturin verður í Kollafirði, har KÍF skal royna at vinna seg nærri Kyndil í eini roynd at sleppa av botnsessinum.

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 15 | 12 | - | 1 | - | 2 | 395 | 308 | 87 | 25 |
| 2 VB | 15 | 10 | - | 0 | - | 5 | 432 | 360 | 72 | 20 |
| 3 Neistin | 15 | 8 | - | 3 | - | 4 | 388 | 363 | 25 | 19 |
| 4 Tjaldur | 14 | 8 | - | 2 | - | 4 | 372 | 337 | 35 | 18 |
| 5 StÍF | 15 | 3 | - | 0 | - | 12 | 370 | 445 | -75 | 6 |
| 6 Kyndil | 14 | 0 | - | 0 | - | 14 | 245 | 389 | -144 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF *) | 14 | 12 | - | 0 | - | 2 | 396 | 355 | 41 | 22 |
| 2 H71 | 15 | 9 | - | 0 | - | 6 | 394 | 349 | 45 | 20 |
| 3 Neistin *) | 14 | 9 | - | 0 | - | 5 | 413 | 393 | 20 | 18 |
| 4 StÍF | 15 | 6 | - | 2 | - | 7 | 365 | 359 | 6 | 14 |
| 5 Kyndil | 15 | 4 | - | 2 | - | 9 | 364 | 406 | -72 | 10 |
| 6 KÍF | 15 | 2 | - | 0 | - | 13 | 352 | 422 | -70 | 4 |

*) Kappingarnevndin hevur ógildað úrslitið av dystinum millum Neistan og VÍF tann 18. januar, og tí er hesin ikki roknaður við á stigatalvuni

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 16 | 14 | - | 2 | 45 | 21 | 24 | 17 |
| 2 Fleyr | 15 | 10 | - | 5 | 34 | 22 | 12 | 13 |
| 3 Mjølnir | 15 | 9 | - | 6 | 28 | 25 | 9 | 10 |
| 4 Dráttur | 15 | 8 | - | 7 | 33 | 28 | 5 | 9 |
| 5 ÍF | 14 | 7 | - | 7 | 27 | 25 | 2 | 8 |
| 6 KÍF | 16 | 5 | - | 11 | 27 | 38 | -11 | 7 |
| 7 TB | 15 | 0 | - | 15 | 4 | 45 | -41 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 10 | 9 | - | 1 | 29 | 11 | 18 | 13 |
| 2 SÍ | 10 | 5 | - | 5 | 21 | 19 | 2 | 6 |
| 3 Mjølnir | 10 | 3 | - | 7 | 15 | 26 | -11 | 6 |
| 4 Fleyr | 10 | 3 | - | 7 | 14 | 23 | -9 | 3 |